UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **6. mai 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-148**

Svar

upp á

skrivligan § 52 a fyrispurning nr. 52-129/2020 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Fyrispurningurin er um Sernám og er soljóðandi:

1. Hvussu nógv av arbeiðsorkuni hjá Sernámi fer til ávíkavíst skúlaøkið, barnagarðsøkið og serøkið?
2. Hvussu nógvar pengar brúkar Sernám á hvørjum av hesum økjum?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at hækka játtanina til Sernám?
4. Hevur landstýrismaðurin ætlanir um at bjóða kommununum at verða partur av fíggingini av Sernámi fyri at styrkja stovnin?

Svar

Til 1: Talvan niðanfyri vísir, hvussu arbeiðsorkan hjá Sernámi er býtt millum ymsu fakbólkarnar til ávikavist undir skúlaaldri og í skúlaaldri.

Fakbólkar	Ársverk	Undir skúlaaldur	Í skúlaaldri	Ársverk undir skúlaaldri	Ársverk í skúlaaldri
Sernámsfr. ráðgevar	8,05	39%	61%	3,1	4,9
Sálarfrøðingar	7,2	24%	76%	1,7	5,5
Taliráðgevar	6,94	72%	28%	5,0	1,9
Rørsla	1,32	72%	28%	1,0	0,4
Sjónráðgevi	0,25	50%	50%	0,1	0,1
Orðblindaráðgevi	0,25	0%	100%	0,0	0,3
Samlað	24,01	46%	54%	10,9	13,1
Sersamskifti, kann ikki býtast	0,89				
Miðnám, sálarfrøði	2,25				
Ikki býtt undir/yvir skúlaaldri	3,14				
Sálarfrøðingar og ráðgevar íalt	27,15				

Arbeiðsorkan til toymið Sersamskifti, ið ráðgevur í mun til børn, sum oftast eru sera sjúk og hava stórar kropsligar avmarkingar, er í talvuni ikki býtt millum í og undir skúlaaldur. Hesi børn hava ofta ein tørv longu frá føðing, og eru lítið á stovni ella í skúla. Tey fara úr skipanni hjá Sernámi sum 18 ára gomul og víðari til AV.

Spurningurin snýr seg ikki um miðnámsøkið. Sernám varðar av sálarfrøðiligu tænastuni á miðnámsøkinum, sum er 2,25 ársverk (3 størv) og fatar um miðnámsskúlarnar og Serligt Skipað Miðnám (SSM).

Í talvuni omanfyri er ikki roknað fakligir dagar og serstøk undrirvísingartilboð, sum eisini eru til børn í skúlaaldri. So arbeiðsorkan til børn í skúlaaldri er nakað hægri enn víst í talvuni.

Til 2: Lønarútreiðlur hjá Sernám eru íalt umleið 19,3 mió. kr., og samlaða talið á ársverkum eru 34 ársverk. Verða ársverkini drigin frá, sum arbeiða við miðnám, er 18,0 mió. kr. eftir til børn undir og í skúlaaldri. Roknað er við, at felagsútreiðslur til fyrisiting og leiðslu v.m. eru býtt í sama lutfallið. Hetta merkir, at fylgjandi býti er millum økini:

	Býtið	Mió. kr.
Lønarútreiðslur í skúlaaldri	54%	9,7
Lønarútreiðslur undir skúlaaldri	46%	8,3
Íalt	100%	18,0

Tað skal leggjast afturat, at tað ikki gevur eina fullfíggjaða mynd av samlaðu játtanini til Serøkið í fólkaskúlanum í Føroyum einans at eftirkanna, hvussu útreiðslurnar hjá Sernámi eru býttar millum økini fólkaskúlin og dagstovnaøkið. Tí játtaðar verða upphæddir innan aðrar skipanir og á øðrum kontum á fíggjarlógini eisini, bæði til fólkaskúlaøkið og til dagstovnaøkið.

Til 3: Landsstýrismaðurin leggur stóran dent á, at sernámsfrøðiliga økið, sum fevnir um sernámsfrøðiliga ráðgeving, hjálp og undirvísing til børn og ung við serligum tørvi, er skipað so væl sum til ber. Kannað fer at verða, um tað ber til at skipa viðurskiftini øðrvísi, og um neyðugt er at gera umraðfestingar til hetta øki. Økið má greinast nærri, bæði við atliti at tí stóra tørvi, sum skúlarnir vísa á er innan sálarfrøðiliga hjálp til børn og ung og innan sernámsfrøðilig átøk sum heild.

Til 4: Landsstýrismaðurin fer at greina spurningin nærri og seta seg í samband við kommunala geiran við tí endamáli at tryggja best møguliga samstarv viðvíkjandi stuðli til børn við serligum tørvi. Dagstovnaøkið er lagt til kommunurnar at umsita, meðan fólkaskúlin er landspolitisk ábyrgd.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður